gult cyan magenta svart



# Eldur í bussi hjá Bygdaleiðum

**Mikudagin kom eldur í ein buss hjá Bygdaleiðum í Norðoyggjum. Eingi ferðafólk vóru í bussinum, og førarin sløkti sjálvur eldin**



*Motorurin logaði, tá hesin bussurin kom til Viðareiðis seinnapartin mikudagin. Førarin sløkti eldin við eldsløkkjara.*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

ELDSBRUNI
*Eyðun Klakstein*

**Viðareiði:** Seinnapartin mikudagin kom eldur í ein av bláu bussunum hjá Bygdaleiðum.

Bussurin var júst komin til Viðareiðis, tá førarin gjørdist varugur við, at eldur var í motorinum.

– Eg veit ikki, hví eldur kom í. Helst hevur onkur leki verið í motorinum, tí olja var á vegnum aftan fyri bussin, sigur Olivar Askham, sum koyrdi bussin.

## Sløkti við skúmi

Eingi ferðafólk var í bussinum, tá eldur kom í.

– Eg fór út við einum eldsløkkjara og sprændi pulvur inn í motorrúmið. Síðani lat eg motorlúkuna aftur, og tað vísti seg at verða nóg mikið til at sløkkja eldin, greiðir Olivar frá.

Helst hevur onkur eksplosión verið í motorinum, tí lutir frá motorinum lógu á vegnum.

## Spulaðu vegin

Sløkkiliðið í Klaksvík varð boðsent, og tríggir bilar hjá sløkkiliðnum fóru avstað nakað fyri klokkan 14.00.

Tá sløkkiliðið kom á staðið var eldurin sløktur.

Sløkkiliðið spulaði tó vegin, tí nakað av olju var likið úr motorinum, og tað kundi verða til vanda fyri ferðsluna.

## Sýna skaðan

Bussurin, sum eldur kom í, er ein Scania 112, sum hevur 14 ár og næstan 900.000 kilometrar á baki.

Seinnapartin mikudagin varð skaðin sýnaður fyri at fáa greiði á, um bussurin skuldi gerast í stand aftur, og hvussu nógv hetta fór at kosta.

Fyribils niðurstøðan er, at bussurin verður gjørdur aftur. Neyðugt verður at skifta motorin og gera aðrar umvælingar, og tað fer at taka nakrar vikur.

## Skúlabørn ferðast

Strandferðslan fór beinanvegin mikudagin í holt við at finna onkra fyribils loysn á trupulleikunum.

Tað eru serliga skúlabørn, sum brúka farleiðina av Viðareiði og til Klaksvíkar.

Um morgnarnar og eftir skúlatíð eru eini 30 skúlabørn, sum vanliga ferðast við bussinum, og tí eru tað serliga tey, sum hava tørv á eini skjótari loysn.

## Tann øðrvísi møguleikin

**Tekniski skúli í Klaksvík bjóðar sum einasti skúlin í landinum tekniska studentsútbúgving**

Síðani 1993 hava føroyskir ungdómar havt møguleikan at taka miðnámsútbúgving á Tekniska skúla í Klaksvík.

Talan er um tekniskar studentar, har undirvísingin er ein blanding av bókligum og verkligum lærugreinum. Ein triðingur av frálæruni fer fram á einum av verkstaðunum á skúlanum.

Útbúgvingin tekur trý ár. Í løtuni er ein flokkur í hvørjum árgangi, og tilsamans eru 22 næmingar í holt við útbúgvingina.

Tekniska studentsútbúgvingin gevur teir somu møguleikarnir fyri víðari útbúgving sum tilsvarandi útbúgvingar – HF, student og handilsskúli.

### Munur á útbúgvingum

Næmingarnir, sum ganga á Tekniska skúla í Klaksvík, koma úr øllum landinum, og møguleiki er at búgva á skúlaheiminum, sum hoyrir til skúlan.

Munurin millum teknisku studentsútbúgvingina og hinar miðnámsútbúgvingarnar er, at størri dentur verður lagdur á verkligu lærugreinarnar. Næmingarnir sleppa at royna seg við timbri, el, á maskinverkstaði og í starvsstovu.

Næmingarnir hava stóra ávirkan á, hvussu útbúgvingin fer fram, tí tað eru nógvir valmøguleikar. Skúlin leggur dent á, at næmingarnir sleppa at royna seg, og at teir fáa møguleikan at menna seg.

Skúlin leggur upp til, at næmingarnir sleppa at brúka bæði bókligu og handaligu vitanina í tvørfakligum uppgávum.

Leygardagin hevur Tekniski skúli í Klaksvík opið hús,og tá ber til at hyggja eftir umstøðunum og at kunna seg við viðurskiftini á skúlanum.

# Stórur áhugi fyri eldraíbúðum

**Klaksvíkar kommuna fær dagliga umsøknir frá fólki, sum vilja sleppa í nýggju eldraíbúðirnar undir Kráarbrekku**

BYGGING
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Arbeiðið at gera eldraíbúðir í Klaksvík er boðið út alment, og í summar skal arbeiðið í gongd.

Áhugin fyri hesum eldraíbúðum er ovurhonds stórur, og Klaksvíkar kommuna hevur fingið eina ørgrynnu av umsøknum frá fólki, sum vilja sleppa í hesar íbúðirnar.

– Tú kanst siga, at vit fáa mest sum dagliga umsøknir. Fólk halda eldraíbúðirnar verða eitt gott hugskot, og tað eru nógv, sum vilja sleppa inn í eina av íbúðunum, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Hann hevur nú tikið við eftir Jógvan við Keldu sum limur í nevndini fyri sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku.



*Útgrevsturin undir Kráarbrekku hevur gingið væl, og um nakrar mánaðir verður farið undir at byggja eldraíbúðirnar.*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

## Gingið væl higartil

Arbeiðið undir Kráarbrekku byrjaði í fjør. Útgrevsturin er gjørdur, og nú er klárt at fara undir sjálva byggingina av íbúðunum og sambýlinum.

– Tað hevur gingið sera væl við útgrevstrinum, og vit eru sera væl nøgd við hetta arbeiðið. Tað er væl frágingið, sigur Steinbjørn Jacobsen.

Útbjóðingin av sambýlinum hevur verið, og hetta arbeiðið skal í gongd sum skjótast.

Fyrst í apríl mánaði verða tilboðini til byggingina av íbúðum latin upp, og síðani er ætlanin, at hetta arbeiðið skal fara í gongd sum skjótast.

## Húsini ov stór

Verkætlanin undir Kráarbrekku er býtt sundur í nógv smærri arbeiðið fyri at fáa fleiri feløg við.

Sambýlið skal eftir ætlan verða liðugt næsta ár, meðan eldraíbúðirnar skulu takast í nýtslu á heysti í 2003.

– Tað eru nógv fólk, sum eru komin upp í árini, sum hava stór hús. Tey kundu hugsa sær smærri íbúðir, tí tað er óneyðugt við stórum húsum til tey, sigur Steinbjørn Jacobsen sum eina orsøk til áhugan fyri eldraíbúðunum.

– At fólk flyta úr húsum og í eldraíbúðirnar, fer eisini at bøta um bústaðarstøðuna í býnum, tí fleiri hús fara at verða tøk.Í løtuni er stórur tørvur á íbúðum og grundstykkjum í Klaksvík.

Vit hava latið upp nýggja skrivstovu

STATOIL FÆRØYENE A.S.
Tórsgøta 17
Postbox 138
FO-110 Tórshavn
telefon 35 72 00
fax 35 72 01

STATOIL



# Semja kann styrkja Helenu

**Eydnast tað Helenu Dam á Neystabø at bjarga samgonguni, verður helst talan um ein politiskan sigur, ið kann styrkja hana og Sjálvstýrisflokkin til eitt komandi val**



*Semja í samgonguni kann gerast ein politiskur sigur fyri Helenu Dam á Neystabø*

ANALYSA
*John Johannessen*

Úrslitið hjá Sjálvstýrisflokkinum í seinastu veljarakanningini var vánaligt. Hann fekk bert 4,0 prosent av samlaðu atkvøðunum og misti annað av sínum tveimum umboðum á tingi.

Hetta úrslit fær Helena Dam á Neystabø helst betrað um, eydnast tað henni at finna eina semju millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin í tí, sum einaferð varð kallað fullveldismálið.

Einki er at ivast í, at trúvirði hjá bæði Anfinn Kallsberg og Høgna Hoydal er í vanda í hesum innanhýsis stríðnum, sum mesta av tí seinasta mánaðinum hevur skapt eitt politiskt vakum og ørkymlað veljaraskaran.

Anfinn Kallsberg stóð á odda, tá samgongan 1. februar við stórum yvirskriftum boðaði frá nýggja sjálvstýrisleisti sínum. Men longu tvær vikur seinni boðaði hann frá, at hann ikki longur tók undir við leistinum, og legði í staðin fram ein nýggjan leist um víðkað sjálvstýri innan fyri heimastýrislógina. Hetta eigur helst at ávirka trúvirðið úti millum veljararnar.

Høgni Hoydal hevur alla tíðina staðið við sítt. Tað gjørdi hann eisini, tá hann, hóast mótmæli frá løgmanni, lat Løgtingsskrivstovuni uppskotið um sjálvstýrisleistin. Men Høgni Hoydal bar eisini Løgtingsskrivstovuni eitt annað uppskot. Tað var nevniliga uppskotið um at staðfesta sjálvsavgerðarrættin. Hetta uppskotið var ikki við í samgongusemjuni frá 1. februar.

Eftir nógv trýst, hóttanir og einum uppsagnarbrævi í lummanum hjá Anfinni Kallsberg, bakkaði Høgni Hoydal og tók uppskot síni aftur, beint áðrenn løgtingsformaðurin legði tey fram í løgtinginum seinasta framløgudagin. Høgni Hoydal misti nú andlit – og helst eisini trúðvirði millum veljarar sínar. Hann hevði jú lovað teimum so nógv.

Eftir stendur so Helena Dam á Neystabø. Hon hevur havt eitt ógvuliga hart politiskt lív seinastu tíðina. Fyri fáum vikum síðani misti hon sessin sum landsstýriskvinna, tí tað var staðfest, at hon hevði handlað uttan heimild í pensjónsmálinum. Men hon er framvegis formaður Sjálvstýrisfloksins og roynir nú at fáa semju í lag í samgonguni.

Hóast Helena misti sessin orsakað av pensjónsmálinum, hevur júst hetta mál helst gjørt hana væl umtókta millum pensjónistar. Hon var jú tann, ið gav teimum hægri pensjón. So kann freamferðarhátturin vera líkamikið – fyri tey.

Og eydnast tað eisini Helenu Dam á Neystabø at bjarga samgonguna og fullveldispolitikkin á ein ella annan hátt, verður hon helst eitt slag av politiskari hetju, og kann vænta sær eitt rúkandi úrslit til næsta val. Helena Dam á Neystabø er taktikkari sum fáur.

# Helena roynir semju

**Forkvinnan í Sjálvstýrisflokkinum hevur tikið á seg leiklutin sum semingskvinna fyri at bjarga samgonguni. Hon legði í gjár semingsuppskot um ríkisrættarliga politikkin fyri Høgna Hoydal og Anfinn Kallsberg**

SAMGONGUSTRÍÐ
*John Johannessen*



*Sjálvstýrisflokkurin við Helenu Dam á Neystabø á odda ger nú eina seinastu roynd at bjarga samgonguni. Helena Dam á Neystabø legði í gjár eitt semingsuppskot fyri Høgna Hoydal og Anfinn Kallsberg í samgongutrætuni*

Útlitini tykjast ikki góð fyri at finna eina semju millum teir báðar samgonguflokkarnar Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin, í trætuni um politikkin á sjálvstýrisleið.

Men Helena Dam á Neystabø, forkvinna Sjálvstýrisfloksins, hevur kortini ikki mist mótið. Hon legði fyrrapartin í gjár saman við flokki sínum seinastu hon á eitt semingsuppskot, sum hon seinni legði fyri Høgna Hoydal og Anfinn Kallsberg.

Tá Sosialurin tosaði við Helenu Dam á Neystabø beint áðrenn middag í gjár, vildi hon einki siga um innihaldið í uppskotinum.

– Eg kann ikki gera almennar viðmerkingar til loysnir okkara, tí so dettur alt bara á gólvið beinan vegin, segði Helena Dam á Neystabø áðrenn hon fór á fund við Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin.

## Skal hava byrjan og enda

Hóast samgonguflokkarnir hava samráðst um innanhýsis ósemjuna síðani løgmaður kom aftur úr Bretlandi seinasta hósdag, eru teir ikki komnir nærri hvørjum øðrum.

Tjóðveldisflokkurin stendur fast við, at hann vil hava ein bundnan sjálvstýrisleist fram at fullveldinum við eini byrjan og einum enda. Hann vil, at løgtingið skal samtykka ein bundnan leist at yvirtaka eftir, sum endar við einari fólkaatkvøðu í 2012 um at staðfesta Føroyar sum fullveldisríki.

Harafturat vil Tjóðveldisflokkurin eisini hava eitt uppskot í løgtingið um at staðfesta, at Føroyar hava sjálvsavgerðarrætt, og at landsstýrið síðani skal boða ST frá hesum.

Fólkaflokkurin kann sum so liva við einum bundnum sjálvstýrisleisti. Men hann vil ikki hava, at tað skal vera ásett, at leisturin skal enda í 2012 við einari fólkaatkvøðu um suverenitetin.

Heldur ikki vil Fólkaflokkurin, at løgtingið skal samtykkja, at Føroyar hava sjálvsavgerðarrætt. Fólkaflokkurin heldur, at eitt uppskot ikki eigur at fara í tingið um nakað, sum er so sjálvsagt, sum dagurin í dag.

## Endin nærkast

Tað er sostatt heilt greitt, at báðir flokkar ynskja at yvirtaka innan fyri heimastýrislógina, til vit einaferð eru komin so langt, at vit kunnu atkvøða um føroyskt fullveldi.

Men hóast nógvar og drúgvar fundir, er enn ikki eydnast flokkunum at finna eina semju um røttu mannagongdirnar, sum teir annars 1. februar søgdu seg vera púra samdar um.

Royndin hjá Helenu Dam á Neystabø verður helst seinasta royndin at bjarga samgonguni

– Eg havi á fundunum roynt at fáa partarnar at semjast, men nú geri eg eina seinastu roynd, segði Helena Dam á Neystabø, tá vit tosaðu við hana beint áðrenn døgurða í gjár.

Sosialurin skilir, at Tjóðveldisflokkurin eisini er troyttur av oyðimarkargongdini og vil hava at vita, um tað ber ella brestur áðrenn vikuskiftið.